Fólkaatkvøðan í stríð við fólkaræði:

# Kunnu ikki binda løgtingið

**Uppskotið hjá landsstýrinum til fólkaatkvøðuna í mai er í stríð við vanliga fólkaræðisliga siðvenju. Tað ber nevnilga ikki til at binda komandi løgting til ein ávísan politiskan leist komandi 12 árini. Hetta eru føroyskir løgfrøðingar á einum máli um**

FÓLKAATKVØÐAN
*John Johannessen*



*Løgfrøðingar meta fólkaatkvøðuna at verða ivasama fólkaræðisliga sæð*
*Mynd: Jens Kristian V.*

Bindandi fólkaatkvøðan, sum landsstýrið ætlar at halda 26. mai, er púra óbindandi.

Hetta eru løgfrøðingar, Sosialurin hevur tosað við, púra samdir um.

– Uppskotið hjá landsstýrinum gevur sitandi løgtingi størri heimildir enn øðrum komandi. Hetta er beinleiðis í stríð við vanligar fólkarættarligar siðvenjur bæði í Føroyum og í okkara grannalondum, sigur Bjørn á Heygum, sum var ein av teimum fýra løgfrøðingunum, ið gjørdu føroysku stýrisskipanarlógina.

Royndi løgfrøðingurin, Halgir Winther Poulsen, hevur somu fatan, sum Bjørn á Heygum. Hann sigur, at tað ikki ber til at lóggeva fyri meira enn eitt komandi løgting. Tí ber heldur ikki til at lóggeva 12 ár fram í tíðina.

Hans Trúgvi Teirin, løgfrøðingur var eins og Bjørn á Heygum við til at orða galdandi stýrisskipanarlóg Føroya. Hann segði við Útvarpið fyrrakvøldið, at hann ikki metti ætlanina hjá landsstýrinum vera í stríð við stýrisskipanarlógina. Men samstundis gjørdi hann greitt, at talan ikki kann vera um eina bindandi fólkaatkvøðu. Hann segði, at fólkaatkvøðan má fatast sum ein vegleiðandi fólkaatkvøða, sum bara er moralskt bindandi fyri komandi landsstýri.

Hans Trúgvi Teirin vísti á, at sjálvt um føroyski veljarin tekur undir við lógini á eini fólkaatkvøðu, so er hendan lógin ikki ørðvísi enn aðrar lógir. Tí ein fólkaatkvøða er ikki oman fyri aðra lóggávu. Hetta sama sigur Bjørn á Heygum.

Sostatt kann eitt komandi løgting, ið ikki tekur undir við koyriætlanini fram móti fullveldinum, taka av lógina ella broyta hana við vanligari atkvøðgreiðslu.

### Skulu hava úrslit

Sambandsflokkurin skjeyt í 1999 upp, at haldast skuldi ein vegleiðandi fólkaatkvøða í Føroyum um fullveldisspurningin. Á fólkaatkvøðuni skuldi spyrjast, um veljarin vildi, at landsstýrið tók upp samráðingar við danir um fullveldi, ella um hann vildi hava, at landsstýrið tók upp samráðingar um eina nýggja stjórnarskipan innan fyri ríkisfelagsskapin.
Í sambandi við viðgerina av hesum uppskoti gjørdi grundlógarnevnin eitt upprit til uttanlandsnevndina um fólkaatkvøður.

Niðurstøðan hjá Kára á Rógvi og Jóan Paula Joensen var millum annað, at ein vegleiðandi fólkaatkvøða – sum allar fólkaatkvøður í Føroyum eru – bindur ikki løgfrøðiliga, men at tað neyvan er hugsandi, at tingið gongur ímóti eini fólkaatkvøðu.

Uttanlandsnevndin viðgjørdi uppritið hjá grundlógarnevndini. Niðurstøðan hjá uttanlandsnevndini var, at fólkaatkvøða ikki eigur at verða hildin fyrr enn ein sáttmáli fyriliggur millum Føroya Landsstýri og donsku stjórnina. Í meirilutanum í uttanlandsnevndini, sum kom til hesa niðurstøðu, vóru Hergeir Nielsen, Jógvan við Keldu, Jákup Sverri Kass og Jenis av Rana.

### Skal vera bindandi

Hóast løgfrøðingar vísa á, at fólkaatkvøðan 26. mai ikki kann vera bindandi, heldur Høgni Hoydal fast um, at talan verður um eina bindandi fólkaatkvøðu.

Høgni Hoydal sigur seg ikki vilja koma inn á løgfrøðisligar smálutir í uppskotinum, men leggur dent á, at talan verður um eina bindandi fólkaatkvøðu.

– Hetta er ikki ein spurningur um løgfrøði. Fyri meg er hetta ein spurningur, um føroyska politiska skipanin virðir eina fólkaatkvøðu. Vit hava ongar ásetingar í stýrisskipanarlógini um fólkaatkvøðu, men vit skjóta upp, at vit halda eina fólkaatkvøðu, so Føroya fólk kann hava seinasta orðið at siga, sigur Høgni Hoydal.

Høgni Hoydal stendur fast við, at hóast veljarin møguliga um nøkur ár velur Sambandsflokkin sum størsta flokk, skal løgtingið framhaldandi halda seg til fullveldiskoyriætlanina hjá landsstýrinum.

– Politiskt snýr hetta seg um, at vit vilja hava eina fólkaatkvøðu fyri at spyra fólkið, um tey taka undir við, at vit nú ganga fullveldisleið. So kunnu løgfrøðingar og politikarar kjakast um hetta langt fram í tíðina.

Høgni Hoydal heldur tað vera púra náttúrligt fólkaræði, at fólkaatkvøðan bindur komandi løgting 12 ár fram í tíðina. Hann heldur, at um lógaruppskotið er góðtikið á fólkaatkvøðu, má eisini fólkaatkvøða til, fyri at taka tað av aftur.

Javnaðarflokkurin mælir frá:

# Vil ikki loysa frá Danmark

**– Stóri munurin á uppskotinum hjá samgonguni og uppskotinum hjá Javnaðarflokkinum er, at vit alla tíðina vilja hyggja eftir, um tað búskaparliga ber til at fremja yvirtøkur ella ikki, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins**

*Eirikur Lindenskov*



*– Vit taka ikki undir við ætlanini at loysa frá Danmark. Hóast vit vilja fara langt á sjálvstýrisleið, so er tað hasin grundleggjandi munurin, sigur Jóannes Eidesgaard*

– Millum manna hevur Javnaðarflokkurin kanska staðið sum ein flokkur, sum ikki hevur verið so avgjørdur í málinum um framtíðarstøðu Føroya hesi seinastu trý árini. Onkur hevur enntá skotið okkum í skógvarnar, at vit ta einu løtuna hava verið nær fullveldisætlanini hjá landsstýrinum, meðan vit næstu løtuna hava verið í sambandsleypinum. Men hetta er tí, at vit hava lagt okkum eftir at verið við í kjakinum fyri at fáa eina breiða semju.

Hetta sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, eftir at flokkurin hóskvøldið greitt boðaði frá, at hann var í móti nýggju fullveldistilgongdini hjá landsstýrinum, og at hann fór at mæla veljarum sínum til at atkvøða nei á fólkaatkvøðuni 26. mai.
Jóannes Eidesgaard sigur seg hava hildið, at løgmaður meinti tað, tá hann tosaði um týdningin av, at málið varð loyst við einum breiðum meiriluta. Kortini heldur hann seg nú kunna staðfesta, at løgmaður einki hevur meint við hetta, og vísir á, at Fólkaflokkurin nú liggur skerflatur fyri Tjóðveldisflokkinum. Jóannes Eidesgaard vísir á, at allir tingmenninir hjá Tjóðveldisflokkinum vóru til staðar á tíðindafundinum í Tinganesi hóskvøldið, meðan Anfinn Kallsberg og Helena Dam á Neystabø einsamøll umboðaðu sínar flokkar. Hetta tulkar Jóannes Eidesgaard so, at Tjóðveldisflokkurin hevur vunnið hetta slagið.

– Ikki minst, tá vit samanbera við tað, sum formaðurin í tingbólkinum hjá Fólkaflokkinum, Óli Breckmann, í sjónvarpinum týskvøldið segði um, at tað ikki verður talan um nakra fólkaatkvøðu, fyrr enn semja varð gjørd við stjórnina.

– Men Javnaðarflokkurin hevur staðið á odda fyri nógvum yvirtøkum, hví kann flokkurin so ikki taka undir við tí partinum av uppskotinum, sum snýr seg um yvirtøkurnar?

– Fyri tað fyrsta, so ber tað als ikki til at taka undir við einum parti av hesi ætlan, sigur Jóannes Eidesgaard. Fyri tað næsta, so er tað ein himmalvíður munur á hesi ætlan, og so teirri, sum Javnaðarflokkurin hevur skotið upp í sjálvstýrislógaruppskotinum.
Í uppskotinum hjá Javnaðarflokkinum skal løgtingið gera av, nær ávísu økini skulu yvirtakast, men tað skal ikki yvirtakast, fyrr enn fíggjarligar og umsitingarligar fyritreytir eru til staðar. Jóannes Eidesgaard vísir á, at landsstýrið hinvegin hevur gjørt eina yvirtøkuætlan, sum sigur, nær ávísu økini skulu yvirtakast, samstundis sum ríkisstuðulin eftir eini tíðarætlan skal minkast.

– Vit sum hava verið við í politikki vita, at føroyski búskapurin so ótrúliga skjótt kann koma fyri bakkøstum. Í 1992 høvdu vit ein toskafiskiskap upp á 5.000 tons, meðan hann í dag er omanfyri 40.000 tons – og hesi seinastu árini er prísurin fleirfaldaður, sigur Jóannes Eidesgaard, við hesum vísir á, at vit hava havt ein búskaparligan viðvind av ókendum dimensiónum nú í nøkur ár.
Hann vísir á, at vit koma fyri bakkøstum aftur, og tí heldur hann tað vera skilagott við einum búskapargrunni at standa ímóti við. Men hann vísir kortini á, at tað er ikki hetta, sum er endamálið við búskapargrunninum, sum landsstýrið skjýtur upp.

– Høgni Hoydal segði á fundinum hóskvøldið, at pengarnir verða settir av fyri at fíggja fullveldisætlanina. Vit kunnu jú bara ímynda okkum, um vit koma fyri einum búskaparligum bakkasti og kanska hava hall á fíggjarlógini t. d. í 2004 – og at vit samstundis skulu yvirtaka t. d. løgregluna fyri 35 mió krónur – tá brennir saman hjá landsstýrinum, sigur Jóannes Eidesgaard, sum vísir á, at stóri munurin á uppskotinum hjá samgonguni og uppskotinum hjá Javnaðarflokkinum er, at Javnaðarflokkurin alla tíðina vil hyggja eftir, um tað ber til at gjøgnumføra ætlanina ella ikki.

– Eru vit føru fyri at gjøgnumføra hana, so gera vit tað, eru vit ikki tað, ja so mugu vit bíða til tíðirnar verða betur, sigur Jóannes Eidesgaard, sum leggur afturat, at man ikki kann binda seg til eina ætlan fyri eina framtíð, sum vit ikki kenna. Hetta heldur hann vera ábyrgdarleyst og skilaleyst.

Javnaðarflokkurin kann heldur ikki undir nøkrum umstøðum taka undir við, at eitt løgting skal kunna leggja arbeiðsætlanina til rættis fyri fleiri komandi løgting.

– Hetta er í stríð við alla okkara demokratisku uppfata, og vit meta tað eisini vera í stríð við stýrisskipanarlógina, at vit samtykkja eina lóg, sum brádliga tekur stýrisskipanarlógina av ræði – stýrisskipanarlógina, sum skuldi verið tann mest týðandi lógin í føroyskum politikki.

Jóannes Eidesgaard heldur tað eisini vera løgið, at hendan samgongan, sum ikki hevur megnað at minka blokkstuðulin úr Danmark við einari krónu, nú skal siga Føroya fólki, hvussu vit niðurlaga blokkin, og at somu fólk, sum onga yvirtøku hava framt, nú skulu fortelja Føroya fólki, hvussu allar yvirtøkur í framtíðini skulu fremjast.

Jóannes Eidesgaard annars størsta dentin á, at hendan ætlanin, sum nú er løgd fram, er startskotið til fullveldið – startskotið til at loysa frá Danmark, og hann vísir á, at tað serliga er her, at Javnaðarflokkurin er ósamdur við samgonguna.

– Vit taka ikki undir við ætlanini at loysa frá Danmark. Hóast vit vilja fara langt á sjálvstýrisleið, so er tað hasin grundleggjandi munurin, at vit vilja útbyggja sjálvstýrið innan fyri ríkisfelagsskapin, meðan samgongan við taka stigið fult út.



# Lindin leggur landið undir seg

**Í dag leygardagin klokkan 14 verður nýggi sendarin hjá Lindini á Brúnaskarði tendraður. Fólk í Norðoyggjum kunnu nú eisini hoyra Lindina. Í sambandi við at Lindin víðkar sendinetið fer kristiliga útvarpsstøðin undir nýggjar sendingar og senditímarnir verða eisini fleiri**

ÚTVARP
*Stefan í Skorini*



*Preben Hansen, Símin Hansen og Jenis av Rana, nevndarlimir, fegnast um at sendinetið hjá Lindini nú verður víðkað. Endaliga málið er at røkka út til alt landið*
*Mynd: Jens K. Vang*

Nú er tað eitt ár síðani, at Lindin fór undir at senda kristiligar sendingar, og eitt ára dagurin verður markeraður við, at sendinetið verður víðkað. Nýggi sendarin á Brúnaskarði fer at varpa sendingarnar hjá Lindini út til størsta partin av Norðoyggjum.

Menn frá telefonverkinum hava verið og sett ein sendara upp á skarðinum, og hann stendur nú klárur.

– Málið hjá okkum er, at Lindin skal røkka út til allar føroyingar, og hetta er eitt stig á leiðini, sigur Preben Hansen, nevndarformaður í Lindini.

Næsta málið hjá Lindini er at víðka sendinetið til Vágarnar, Sandoynna og síðani Suðuroynna. Arbeitt verður í løtnuni við at fáa fígging til vega til hesar ætlanirnar.

### Senditíðin longd

Í sambandi við at sendarin á Brúnaskarði verður tendraður verður ein fýra tíma long sending úr Studio Pegasus í Klaksvík, sum norðoyingar skipa fyri. Eisini verður opið hús í Lindini í havn, har fólk kunnu støkka inn á gólvið.

Lindin sendir vanliga frá kl. 13 til kl. 23, men nú verður senditíðin longd, so at byrjað verður nú klokkan 9 hvønn morgun.

Teir í nevndini í Lindini dylja heldur ikki fyri, at teirra endaliga mál er at senda alt samdøgrið, so teir sleppa undan at sløkkja sendaran yvirhøvur.

– Málið er at senda alt samdøgrið, men vit mugu fyrst fáa eina avtalu við KODA og Gramex um tónleikin, sigur Preben Hansen.

Nevndin í Lindini boðar eisini frá, at nýggjar sendingar verða á skránni, nú sendinetið verður víðkað.

Ein av nýggju sendingunum hjá Lindini verður "Spyr Harran fyrst". Har fara fýra samkomuleiðarar at svara ymsum spurningum frá lurtarum. Hon verður skipað sum Spyr Bara hjá Útvarpi Føroya.

Flaggskipið hjá Lindini hevur verið sendingin bønarlindin, har fólk hava kunnað ringt inn við bønarevnum, sum vertirnir so hava biðið fyri í útvarpsstovuni.

Henda sendingin verður framhaldandi á skránni hvønn dag, og tey í Lindini eru ógvuliga fegin um ta stóru undirtøku, henda sendingin hevur fingið. Higartil hava tey fingið eini 5000 bønarevni frá lurtarum, sum hava ringt inn.

Enn er ikki heilt greitt, hvussu væl Lindin fer at hoyrast í teimum fjarskotnastu bygdunum í Norðoyggjum. Símin Hansen, nevndarlimur, sigur tó, at útvarpsbylgjurnar frá sendaranum á Brúnaskarði víðka eisini um sendinetið á Sandoynni, so onkrar bygdir á Sandoynni fara eisini at hoyra Lindina við hesum nýggja sendaranum.

# Svangir svimjarar

**Kaffistovan í svimjihøllini í Havn hevur ikki verið opin í ár, tí hon ber seg ikki. Stórur saknur er í henni, og stjórin hevur tí ætlanir um at lata hana uppaftur, men fyrst skal hon til viðgerða í býráðnum. Mentanarnevndin í býráðnum fer at taka hetta upp á fundi mikukvøldið**

SVIMJIHØLLIN
*Stefan í Skorini*



*Kaffistovan í svimjihøllini í Havn hevur verið stongd síðan 11. desember, men stjórin sigur seg vóna og vænta, at hon skjótt letur uppaftur*

Síðan 11. desember hava gestirnir í svimjihøllini í Havn ikki havt møguleika at vitja kaffistovuna eftir ein túr í hylinum. Tá lat kaffistovan aftur, tí hon bar seg ikki.

Kaffistovan hevur tey seinastu fimm árini verið leigað út til privatpersónar, sum hava rikið hana. Tey, sum hava leigað hana seinastu tvey árini, hava nú valt at snara lykilin um. Enn er eingin funnin, ið vil fara undir at reka kaffistovuna.

Heri á Lava Olsen, stjóri í svimjihøllini, heldur, at stórur saknur er í kaffistovuni, tí at hon var ein týdningarmikil partur av svimjihøllini.

– Vit hava ætlarnir um at lata uppaftur, tí saknur er í henni, men fyrst mugu vit bíða eftir at vita, hvat býráðið sigur til hetta, sigur Heri.

Bæði mentanarnevndin og fíggjarnevndin skulu viðgera málið um kaffistovuna, men enn er ógreitt, hvat fer at koma burturúr.

– Eg bæði vænti og vóni, at hon skjótt kann lata uppaftur, sigur Heri.

Heri heldur, at tað kann vera sera torført, at fáa kaffistovuna at bera seg, tí tey, sum hava roynt seg, hava veruliga gjørt nakað fyri at fáa tað at bera til. Tað hevur tó ikki eydnast.

Enn er ikki greitt, um býráðið fer at lata svimjihøllini fleiri pengar at reka kaffistovuna fyri, ella um stjórin sjálvur skal finna eina loysn.

Kaffistovan í svimjihøllini hevur verið opin síðan 1987, men fólk koma kanska ikki niðan í svimjihøllina fyri at eta seg mett, og tí er torført at fáa hana at mala runt peningaliga.




LESIHESTUR
ELLA
BÓKAORMUR



Vit leita eftir einum ágrýtnum og bjartskygdum **lærlingi**, sum dámar væl at lesa.

Tú skal hava FHS, HH, Studentaskúla ella HF *prógv*.

Lærutíðin er millum **tvey og trý ár**, í mun til hvørja skúlagongd tú hevur.

Tú sleppur niður til Danmarkar **Á SKEIÐ** fýra ferðir í lærutíðini.

Vit hava eitt ***spennadi*** arbeiðsumhvørvi við NÝMÓTANS tøkni, og leggja dent á at veita góða TÆNASTU.

Arbeiðið er *FJØLBROYTT.* Tú kemur m.a. at arbeiða við avgreiðslu, vørumóttøku, bíleggingum, lýsingum og sølueframsýningum.

Vit hava nógvar útlendskar kundar og bíleggja eisini nógv úr útlandinum, so um tú hevur eitt gott **málsligt** oyra, er hetta ein fyrimunur.

Lat okkum frætta frá tær:

Bókasølan
SMS • Postboks 1247 • Tel 319575
www.bokasolan.fo